# Góðtekur ikki at lemmatrolarar fingu ein yvir nakkan

**Hendrik Old góðtekur ikki at lemmatrolararnir verða tvingaðir upp í fiskidagskipanina og næsta ár skulu teir hava hjáveiðikvotuna aftur, sum teir mistu í ár**



*– Framferðin ímóti lemmatrolarunum kann bara byggja á ókunnleika og kanska eisini á øvundsjúku og tað læt landsstýrismaðurin seg tíverri tøla av, sigur Hendrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum*

LEMMATROLARAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tíverri læt Bjørn Kalsø seg lokka ella trýsta av teimum, sum ynskja lemmatrolararnar har sum piparið grør.

Hendrik Old, formaður í vinnunevndini hjá løgtinginum, góðtekur ikki viðferðina, sum lemmatrolararnir hava fingið frá samgonguni.

Lemmatrolararnir hava nú mist 20% av hjáveiðikvotuni á innaru leiðum og nú bátar, sum taka livur, kunnu fáa eyka fiskidagar, eru lemmatrolararnir eisini við sviðusoð, hóast tað júst eru teir, sum taka 75-80% av teirri livur, sum kemur til høldar.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár, eru lemmatrolararnir vónbrotnir av, at teir onga viðurkenning fáa fyri at taka livur.

– Eg veit, at tað eru sterkir áhugabólkar, sum ynskja lemmatrolararnir, har piparið grør og tíverri læt landsstýrismaðurin seg tøla av teimum og tí gav hann lemmatrolarunum ein yvir nakkan, sigur formaðurin í vinnunevndini.

**Skulu ikki tvingast til nakað**

Men hann leggur afturat, at hann góðtekur ikki framferðina.

Hann vísir eisini á, at vinnunevndin hjá løgtinginum vildi hava, at niðurskurðurin hjá lemmatrolarunum skuldi ikki vera størri enn hjá øðrum skipabólkum, men tað varð skúgvað til viks.

– Eg havi í greiðari talu latið landsstýrismannin vita, at eg góðtaki undir ongum umstøðum, at hjáveiðikvotan hjá lemmatrolarunum er skerd 20%, samstundis sum aðrir skipabólkar bara hava mist eini 2% av sínum fiskidøgum, sigur Hendrik Old.

– Tað sum er farið fram, kann bara byggja á ókunnleika til lemmatrolararnar, og kanska eisini á øvundsjúku og tað hevur landsstýrismaðurin tíverri latið seg tøla av.

Hendrik Old tekur tað tískil sum heilt givið, at lemmatrolararnir fáa kvotuna aftur í næsta fiskiárið.

Annars heldur hann, at framferðin hjá landsstýrinum ímóti lemmatrolarunum kann føra við sær, at teir gevast at taka livur, og so er lítið vunnið.

Men lemmatrolararnir eru uttanfyri fiskidagaskipanina og so leingi teir eru tað, heldur Henrik Old, at tað verður torført at geva teimum eyka fiskidagar fyri at taka livur.

– Men teir kunnu heldur ikki revsast við at missa hjáveiðikvotuna.

– Bjørn Kalsø rør frammundir, at lemmatrolararnir skulu undir fiskidagaskipanina og so kunnu koma upp á tal at fáa eyka dagar fyri at taka livur.

– Men tað er heilt greitt, at eg góðtaki undir ongum umstøðum, at lemmatrolararnir verða tvingaðir upp í fiskidagaskipanina.

Hendrik Old sigur, at hetta kann bara vera ein avleiðing av, at landsstýrismaðurin er ikki greiðir yvir, hvønn týdning lemmatrolararnir hava.

– Teir eru teir tryggastu rávøruleverandørar, sum eru til fiskavirkini. Teir kunnu fiska óveðri, tá ið allir aðrir liggja við bryggju og tí eiga vit at lívga um teir.

– Samstundis fiska teir uttarliga og tí er nógv sigling. Av tí at teir eru uttanfyri skipanina, hava teir eisini ráð til at ligga bakk, sigur Hendrik Old.

– Skulu vit tí fáa nyttu burturúr teimum ytru leiðunum, er neyðugt at brúka nógvar dagar og eisini nógvar dagar við ongum fiskiskapi, tí tað er nógv sigling og teir liggja bakk. Tí skulu lemmatrolararnir ikki tvingast upp í fiskidagaskipanina, staðfestir Hendrik Old

# Smyril skal ikki sigla á Tvøroyri fyri onki

**Tvøroyrar Kommuna krevur havnagjald fyri at lata Smyril koma inn á Trongisvágsfjørð. Um neyðugt endar málið í rættinum**

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyrar Býráð góðtekur ikki longur, at Smyril brúkar Trongisvágsfjørð ókeypis.

Tað hevur býráðið gjørt Strandferðsluni greitt.

Býráðið og Strandferðslan hava tosað um støðuna í eina tíð, men enn er ongin semja.

Men tað er samband ímillum partarnar, sigur borgarstjórin, Kristin Michelsen.

Hann leggur kortini afturat, at fæst ikki ein semja við Strandferðsluna, er býráðið til reiðar at fara í rættin í málinum.

Kristin Michelsen ásannar, at landið eigur sjálvt samferðsluhavnina, sum Smyril brúkar á Trongisvágsfirði.

Tí vil Strandferðslan ikki betala havnagjald fyri at sigla inn í samferðsluhavnina.

Men tað góðtekur Tvøroyrar Býráð ikki.

– Havnagjald og brúgvagjald er hvør sítt, sigur borgarstjórin.

Hann sigur, at Tvøroyrar Býráð krevur ikki brúgvagjald frá Smyrli fyri at leggja at í samferðsluhavnina.

– Men havnagjald er nakað annað. Havnagjald er eitt gjald, sum skip rinda fyri at koma inn í havnina, uttan at tey endiliga skulu leggja at bryggju.

– Og tað kann ikki vera meiningin, at Strandferðslan skal brúka okkara havn fyri onki, sigur borgarstjórin.

Annars kravdi Tvøroyrar Býráð eisini hægri havnagjald fyri at Strandferðslan brúkti gomlu samferðsluhavnina á Drelnesi til gamla Smyril.

Tað málið er endað í rættinum, tí Strandferðslan vil ikki betala hægri havnagjald. Málið er viðgjørt í Føroya Rætti og har tapti Tvøroyrar Kommuna. Síðani er málið skotið inn fyri Landsrættin, men har er tað ikki viðgjørt enn.

Vit fingu ikki fatur á Strandferðsluni, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Norðoyingar fortelja suðuroyingum um kommunusamanlegging

**Kommunupolitikarar norðanfjørð skulu nú greiða suðuroyingum frá, hvussu tað riggar at leggja kommunur saman**

KOMMUNUSAMAN-LEGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað verða royndir politikarar norðanfjørðs, sum um ein mánaða skulu til Suðuroyar at greiða býog bygdaráðslimum frá teirra royndum um kommunusamanlegging.

Sum vit søgdu í Sosialinum í gjár, ætlar Tvøroyrar Býráð at skipa fyri fundi í Suðuroy har ætlanin er at lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging í Suðuroy.

Vit skrivaðu, at fundurin var fyri borgarstjórar og skrivarar, men hann er fyri allar bý- og bygdaráðslimir í Suðuroy.

Ein, sum kemur norðaneftir at greiða suðuroyingum frá sínum royndum, er Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavík, sum er høvuðssæti í eini stórari, samanlagdari kommunu. Ein annar er Heðin Zachariasen, sum er borgarstjóri í Sunda Kommunu, men sum áðrenn var borgarstjóri í Hvalvík, sum nú er í Sunda Kommunu. Ein triði er Sofus Johannesen, sum var borgarstjóri við Gjógv og sum nú er bygdaráðslimur í Sunda Kommunu. Samstundis er ætlanin at fáa onkran av gomlu bygdaráðslimunum á Skála, sum nú er í Runavíkar Kommunu, við á fundin.

Og at enda fer Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, at greiða frá, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur á kommunula økinum.

# Til sjós við børnum og ungum við trupulleikum

**Sjólívið skal fáa børn og ung við trupulleikum aftur á rættkjøl**

TILBOÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

At sleppa umborð á skip, er ein góður máti at fáa børn og ung við ymsum trupulleikum aftur á rættkjøl.

Tað heldur Ólavur Groth í Havn.

Hann arbeiðir nú við einum nýggjum tilboði til børn og ung, sum hava trupulleikar av rúsdrekka, rúsevnum ella sum hava aðrar trupulleikar at dragast við.



*Gongst sum ætlað, verður gamli útróðrarbáturin, Annika, nú gjørdur til seglskip, sum skal sigla við børnum og ungum við ymsum trupulleikum. Myndin er úr Skipalistanum*

Og tað tilboðið er at fáa tey til sjós í nakrar vikur.

Í hesum sambandi hevur hann fyri nøkrum árum síðani keypt ein bát, sum hann nú arbeiðir við at rigga til, so at hann kann brúkast til endamálið.

Talan er um 30 tonsaran Anniku, sum er ein gamal útróðrarbátur. Nú er so ætlanin at gera hann til eitt seglskip, sum síðani skal sigla við børnum og ungum við trupulleikum av ymsum slagi.

Umborð er ætlanin at tey skulu læra at basa sínum trupulleikum, eins og tey vera noydd til at samstarva, tí har er jú ongastaðni at fara.

Gongst sum ætlað, kunnu tey fyrstu ungu fara umborð longu í summar.

Fyri at figgja ætlanina hevur hann søkt um stuðul ymsastaðni frá, eisini frá kommununum.

Týskvøldið var málið fyri á fundi í bygdaráðnum í Hvalba, men har tók bygdaráðið ikki undir við umsóknini.

Sjálvur hevur Ólavur Groth ongar viðmerkingar til ætlanina enn.